Bilur til sølu

n sera v l h l n enault gane 2.0 lass t l s lu.
lur n er l óst etallgr nur og er v l tg r ur v ð t. . a r on t on n or at óns s la arst rt ra o v. ban s lara velour setur v. h ta t -ter o etur og ol ut e nstru entborð nu sólgar nu t l ba r t n o.a .a. a e lg a v ð. s naður. ert e n e gar .
o rt 1.700 rg. aug. 7 r sur r. 11 .000

Tlf. 313979 ella 213979

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

KUNNGERÐ

Eykabýráðsfundur verður týsdagin 19. mars 2002, kl. 18.00.

SNARSKIVAN

r b lsst rv

Oyggjaleiðir

V ð hesu verður s t e t r ól t l r- b lsst rv og r t ðaravlo saru at av- lo sa u borð stran aras unu r u le ð 2 . ars t l en an av se te ber. r b lsst rv n verða sett r 2 . ars t l en an av a og r t ðaravlo sarar verða sett r r 1. a t l en an av se te ber. V ð o an unnu t l e na og hv r a t ð verða lutt r u borð ll s h tran aras u an s ns su r- s að av le ðslun .

Størvini fevna um

ar og ann ng stran aras un- u s ulu t lr ttalegg a e n e e t van agl gan ra stur og tr gg a at arbe ðs- gong r eru tr ð v ð lsetn ng n h r t un .
g vurnar evna u
- un at nastu
- Tr g ararbe ð u borð sa svar v ð alt óða r v
- ast ng sa svar v ð alt óða r v
- setan av annagong u r v ð- l ahal sarbe ð og o ng
- a starv v ð n ugle ar og aðrar sa starvs elagar

Førleikakrøv

Umsøkjarar til stýrimann:
- V nnubr v su st r aður
- gl ngarbó
- e lsu rógv agt nasta el r enn 2 r
- rógv n tslu av b arg ngar tgerð
- o avar sl le ðar el r enn r
- rógv

Umsøkjarar til maskinmeistara:
- V nnubr v su s s as n e star - ella as n stur
- gl ngarbó
- e lsu rógv el r enn 2 r
- rógv n tslu av b arg ngar tgerð
- o avar sl le ðar el r enn r

Umsøkjarar til dekkara:
- ullt n atrósur
- gl ngarbó
- e lsu rógv agt nasta el r enn 2 r
- rógv n tslu av b arg ngar tgerð
- o avar sl le ðar el r enn r

Annars rokna vit við, at tú:
- rbe ð r s lvst ðugt og hevur l tt v ð at sa starva
- óðan r us a og er un av narl g- ur

Setanartreytir

etanartre t r verða sa b rt s tt la llu gg ar last r ð og avvaran r s elag.

Umsóknir

só n r v ð avr t av rógvu og gul gu u lu s ulu sen ast t l

Strandfaraskip Landsins
att. tarvs ól a e l n
o s
-110 Tórshavn

og s ulu vera r t un hen se nasta lag 2 . ars 2002.

rr u l s ngar u st rv n unnu ast v ð at ven a s r t l ll e nesen starvs ól ale ðara
Tl . 3 3000 ella e- a l ah ssl. o

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

Útbjóðing

sa ban v ð b gg ng av n gg u barnagarð og v ggustovu an av g verður

BETONGARBEIÐIÐ

herv ð boð ð t al enna l s tat ón.

rbe ð ð sn r seg h vuðshe tu u sto ng av allara og so ul sa anlagt u l. ³.

tb óð ngart l ar ð st r o unus r vstovun an av g ót at l ta r. 1.000 - onto ro a an a nr. 0 2200 ella ro a ar assa 1 1 1 001 .

T lboð a turlatnu br vb lva er tur arna- garður og v ggustova etongarbe ð s ulu verða o unus r vstovun an av g hen se nast t s ag n h n 2 . ars 2002 l. 1 .00.

s tat ón n verður sa a ag l. 1 .30 har te r b óð- an hava gule a r at verða h sta r.

Sandavágs kommuna
Tl . 332 70 a 333 70
t- ostur san avagur san avagur. o

Bilur við skaða til sølu

Merki: un a ent
Árg.: 1 7
KM.: .100

lur n verður sel ur su hann sten ur n .

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

er e he s ns aður
tl . 3 2 a 3 07
e- a l h tr gg ng. o
at h tta na ag-hós ag l. 0 .30-10.00
og 1 .00-1 .00
r gg a ag 0 .00-12.00 og 13.00-1 .00

UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

Skulu spara

Grønlendska heimastýrið noyðist at skerja rakstrarútreiðslurnar. Verður tað ikki gjørt, má skatturin upp. Tað er boðskapurin í einari frágreiðing, sum danska ráðgevandi nevndin viðvíkjandi Grønlandi júst hevur latið heimastýrinum.

Formaðurin í nevndini, Christen Sørensen, sigur, at heimastýrið noyðist at raðfesta tær almennu rakstrarútreiðslurnar. Hann vil ikki koma við nøkrum boði uppá, hvat grønlendingar skulu gera, men nevnir kortini, at útreiðslurnar til vikarar í heilsuverkinum eru ov stórar. Eisini heldur hann tað vera rættari, at tað almenna bíðar við sínum sáttmálasamráðingum, til tann privati arbeiðsmarknaðurin er liðugur við sínar. Sum er fær Grønland 2,8 mia. krónur í blokkstuðuli úr Danmark.

Í trygga legu

OPEC-londini hava eftir øllum at døma fingið tamarhald á oljumarknaðinum, og nú er bara eftir hjá londunum at áseta, hvar oljuprísurin skal liggja.

Roknað verður við minkandi oljugoymslum út á árið, samstundis sum eftirspurningurin fer at veksa. Serfrøðingar vænta, at oljuprísurin fer at liggja nakað oman fyri 20 dollarar fyri tunnuna. Hildið verður, at kemur prísurin upp í einar 24 ella 25 dollarar, fer tað at avmarka búskaparvøksturin í heiminum, og tað fer so aftur at skerja eftirspurningin á oljumarknaðinum. Hetta fer at raka OPEC-londini, men samstundis verður víst á, at fleiri av OPEC-londunum hava búskapartrupulleikar og tí brúk fyri at økja sínar inntøkur.

Vandin fyri kríggi millum USA og Irak kann hótta tann støðuga oljuprísin. Hinvegin tykist tað ikki havt stórvegis ávirkan á prísgongdina, at Russland aftrar seg við at skerja framleiðsluna, soleiðis sum OPEC hevur gjørt. Noreg og Meksiko hava hinvegin fylgt OPEC.

ST vil hava ein palestinskan stat

Fyri fyrstu ferð hevur trygdarráðið hjá ST mælt til at skipa ein palestinskan stat. USA tók stig til samtyktina

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

Í yvirlýsingini, sum trygdarráðið samtykti gjáranáttina, og sum USA heilt óvæntað legði fram, stendur, at málið hjá trygdarráðnum er ein palestinskur statur undir liðini á Ísrael innan fyri trygt og viðurkent mark.

Samstundis verður víst til yvirlýsingar, sum trygdarráðið hevur samtykt fyrr, og sum krevja, at Ísrael skal taka seg aftur av teimum hersettu økjunum.

Noreg hevur formansskapin í ST-trygdarráðnum og norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen, var ovurfegin um samtyktina.

- Hetta eru eini greið boð til ísraelsmenn, og eg haldi ikki, at teir kunnu skáka sær undan teimum. Hendan yvirlýsingin er sera týdningarmikil, segði Jan Petersen í gjár.

ST-aðalskrivarin Kofi Annan heldur røðu á fundinum í trygdarráðnum

Mynd: Reuters

Næstan einmælt

14 av teimum 15 londunum í trygdarráðnum atkvøddu fyri yvirlýsingini. Sýriski sendiharrin, Mikhail Wehbe, atkvøddi ikki, tí hann helt orðalagið vera ov veikt. Hann fýltist á, at yvirlýsingin ikki snýr seg um sjálvan trupulleikan í Miðeystri, sum er tann ísraelska hersetingin, segði hann.

Palestinski ST-eygleiðarin, Nasser Al-Kidwa, helt hinvegin yvirlýsingina hava stóran týdning. Hann segði, at hevði hann havt atkvøðurætt í trygdarráðnum, hevði hann atkvøtt fyri.

Ísraelskir embætismenn vóru eisini nøgdir við orðini í yvirlýsingini, men teir løgdu kortini dent á, at stjórnin í Jerusalem má kanna innihaldið gjølla, áðrenn hon kann gera beinleiðis viðmerkingar. Ísraelska útvarpið vísti tó í gjár á, at Ariel Sharon, forsætisráðharri fyrr hevur sagt seg taka undir við, at ein palestinskur statur verður skipaður.

Annan hvassorðaður

Yvirlýsingin í ST-trygdarráðnum varð samtykt sama dag, sum Ísrael hevði sent fleiri túsund hermenn inn í býir og flóttafólkalegur í Gaza og á Vestara Áarbakka. Minst 30 palestinar lótu lív í atsóknunum.

Undan fundinum í trygdarráðnum hevði ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, funnist hvassliga at framferðini hjá ísraelsmonnum og palestinum. Hann bað palestinararnar gevast við yvirgangsatgerðunum í Ísrael, samstundis sum hann bað ísraelsku stjórnina steðga teirri ólógligu hersetingini av palestinskum økjum.

- Teir hava framvegis møguleikan at forða fyri einari vanlukku, segði Annan og sipaði til Sharon og Arafat.

ST-talsmaðurin, Fred Eckhard, segði, at hetta er fyrstu ferð, at Annan hevur kalla ísraelsku hersetingina ólógliga.

Mugabe vann í Zimbabwe

Zimbabwisku myndugleikarnir siga, at Robert Mugabe vann forsetavalið. Bretland ella USA vilja ikki viðurkenna úrslitið

ZIMBABWE
Árni Joensen

Valmyndugleikarnir í Zimbabwe boðaðu í gjár frá, at landsins forseti seinastu 22 árini, Robert Mugabe, hevði vunnið forsetavalið, sum var um vikuskiftið.

Sambært valmyndugleikunum hevði Mugabe fingið meiri enn tey kravdu 50 prosentini av atkvøðunum. Sagt varð, at Mugabe hevði fingið einar 350.000 atkvøður fleiri enn valevnið hjá andstøðuni, Morgan Tsvangirai.

Men mong ivast í, hvussu rætt tað almenna valúrslitið er.

Bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, segði í gjár, at tað er neyvan nakar ivi um, at Mugabe hevði stolið valið, sum hann tók til.

USA vil heldur ikki viðurkenna almenna valið. Talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Lynn Cassel, segði, at sjálvt um zimbabwisku myndugleikarnir ikki høvdu almannakunngjørt tað endaliga úrslitið, er tað øllum greitt, at talan var ikki um eitt demokratiskt og rættvíst val.

Úr Norðurlondum:

Vána trygd

Kanningar hjá norsku sjóferðslumyndugleikunum vísa, at bjargingarbátarnir umborð á teimum skjóttgangandi ferjunum lúka ikki ásetingarnar í reglunum. Tað eru 350 skjóttgangandi ferjur í Noregi, sum taka meiri enn 100 ferðafólk, og verða tær smærru taldar við, er talið næstan 500.

Sjóferðslumynduglei karnir hava nú givið ferjunum boð um at fáa viðurskiftini við bjargingarbátunum í rættlag innan 1. juli.

SAS gevst

Ferðafólkatalið á flogleiðini millum Danmark og Grønland er nú vorðið so lítið, at leiðslan í SAS heldur tað ikki vera ráðiligt at flúgva hesa rutuna longur. Ístaðin ætlar SAS at lata Grønlandsfly yvirtaka alla flúgvingina. SAS eigur 38 prosent av Grønlandsfly.

SAS nýtir Boeing 767 til grønlandsflúgvingina. Í Grønlandi kunnu hesi flogførini bara lenda í Syðra Streymfirði, meðan Grønlandsfly nýtir Boeing 757, sum eisini kunnu lenda í Narsarsuaq. Tað er tó bara eina ferð um vikuna, at flogfarið lendir har.

Keypa hinumegin

Hóast teir norsku myndugleikarnir hava roynt fleiri tiltøk fyri at fáa fólk at gevast við at fara yvir um markið til Svøríkis at keypa, er gongdin júst tann øvugta. Eitt yvirlit vísir, at handilin um markið vaks 12 prosent í fjør, og at norðmenn helst keyptu fyri umleið 7,5 mia. norskar krónur í Svøríki. Norðmenn keypa eisini nógv í Danmark, men hvussu stórt tað talið er, veit eingin við vissu.

Kanningar í Noregi vísa, at fólk keypa serliga matvørur í Svøríki. Og tað er heldur ikki so løgið. Eitt nú kostar svínakjøt millum 40 og 50 prosent minni í Svøríki enn í Noregi. Rúsdrekka er dýrt í Noregi, og tí fara nógvir norðmenn yvir um markið at keypa rúsdrekka.